JA

BÚNAÐARGRUNNURIN

LUM
Journalnr. 11-17/00041-9

Løgtingsins Umboðsmaður
Undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008
FO-110 TÓRSHAVN

INNKOMIÐ
4 JAN. 2018
Á LUM

Tórshavn, tann 3. januar 2018
Málnr.: 16/00113-36
Tykkara málnr.: LUM-11-17/00040
Málsviðgeri: RIJ

**Viðv. skrivi tykkara j.nr. LUM-11-17/00041-2**

Vísandi til álit tykkara, dagfest 2. november 2017, fer Búnaðargrunnurin við hesum at loyva sær at koma við nøkrum rættleiðingum og viðmerkingum annars.

Miðskeiðis á síðu tvey verður endurgivið úr brævi dagfest 23. mai 2017, sum Løgtingsins umboðsmaður hevur skrivað grunninum. Har verður ført fram, at Búnaðargrunnurin ikki vil lata innlit í innanhýsis reglur viðvíkjandi viðgerð av stuðulsumsóknum. Hetta man vera ein misskiljing, tí her er talan um skjøl, sum klagarin bæði hevur fingið sendandi, umframt at hesi skjøl liggja á heimasíðu grunsins og tí eru almenn.

Niðari verður endurgivið úr sama brævi. Har, eins og seinni í skrivinum, verður sáddur ivi um, um Búnaðargrunnurin er varugur við formligu støðu sína sum almennur stovnur. Hetta er ikki rætt, tí leiðsla grunsins setir nevniliga ikki spurning við, hvørt Búnaðargrunnurin er almennur stovnur, og vil í einum og øllum halda seg til galdandi reglur hesum viðvíkjandi.

Í triðja reglubroti á síðu 3 verður nevnt, at Búnaðargrunnurin áður hevur latið innlit í mál um lánsfígging. Til hetta er at viðmerkja, at hóast grunnurin einaferð fyri fleiri árum síðani hevur gjørt eitt mistak eigur hetta ikki at hava við sær, at sama mistak verður gjørt einaferð enn.

Umboðsmaðurin kemur í fjórða reglubroti á síðu 3 fram til, at sambært § 11, stk. 5 í lóg um Búnaðargrunn, eru allar avgerðir grunsins fyrisitingarligar. Hesum er leiðsla grunsins ikki samd í. Í teimum førum viðskiftafólk grunsins søkja um lán er grunnurin m.a. í fríari kapping við aðrar lánveitarar á lánsmarknaðinum. Talan er um sjálvbodnar samráðingar millum tveir vinnulívspartar, og er tað sjálvboðið millum Búnaðargrunnin og ein umsøkjara hvørt lánsavtala verður gjørd og hvørjar láns- og pantitreytir partarnir annars kunna forhandla seg fram til og blíva samdir um, herundir møguliga kautión og triðjamanspant. Umsøkjari hevur ikki krav uppá eitt lán og talan er um privatrættarligar avgerðir, hvørt lán verður veitt ella ikki, og í játtandi føri undir hvørjum avtalaðum treytum. Talan er um at innganga sáttmála millum tveir partar sum mugu blíva samdir. Somuleiðis er talan um privatrættarligar avgerðir tá Búnaðargrunnurin annars handlar sum lánskreditor og brúkar síni kreditor-

Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • FO-110 Tórshavn • tlf. 35 35 80 • fax 35 35 81 • t-postur bg@bg.fo

og pantirættindi sum t.d. uppsøgn av lánum, umbøn um úttøku, umbøn um konkurs v.m. Verður biðið um innlit í tílík mál verður hetta tí viðgjørt sambært innlitslógini.

Til niðurstøðuna hjá umboðsmanninum er annars at viðmerkja, at grunnurin tekur undir við, at hvat viðgerð av stuðulsumsóknum viðvíkur eru avgerðir í hesum sambandi fyrisitingarligar avgerðir, og verða tískil viðgjørdar samsvarandi hesum.

Sum nevnt omanfyri er øðrvísi við viðgerðum av umsóknum um lán. Hesum viðvíkjandi er leiðsla grunsins framvegis av teirri fatan, at talan viðvíkjandi teimum málum, sum snúgva seg um støðutakan til møguliga lánsveiting til viðskiftafólk grunsins er um privatrættarlig viðurskifti, og tí ikki um avgerðir sambært fyrisitingarrættinum. Innlitsumbønir hesum viðvíkjandi verða tí viðgjørdar sambært innlitslógini, og ikki fyrisitingarlógini.

Tá tað í skrivinum verður ført fram, at Fiskimálaráðið tekur undir við sjónarmiði umboðsmansins er talan um tulking av skrivi dagfest 23. august 2017, sum Fiskimálaráðið hevur sent umboðsmanninum. Fiskimálaráðið kemur fram til, at Búnaðargrunnurin er partur av almennu umsitingini, men ongastaðni sæst, at Fiskimálaráðið harvið metir allar avgerðir grunsins sum fyrisitingarligar.

Umframt hetta kemur Fiskimálaráðið inn á, at Búnaðargrunnurin er fíggjaður við almennum peningi. Í minsta lagi er hetta ein rættiliga víð tulking av, hvat 'fígging við almennum peningi' merkir, tí grunnurin fær ikki rakstrarjáttan av Løgtingsins fíggjarlóg, tvørtur ímóti. Hin vegin rindar grunnurin útreiðslur, sum av røttum áttu at verið goldnar av fíggjarlógini, ella við 'almennum peningi'.

Búnaðargrunnurin er greiður um formligu støðu sína sum almennur stovnur, og vil sum nevnt í einum og øllum liva upp til treytir og ábyrgdir sum fylgja av hesum.

Tá tað kemur til ítøkiliga málið er leiðsla grunsins av teirri fatan, at klagarin hevur fingið innlit í tey skjøl, sum eru tøk í málinum.

B.v.

Regin I. Jakobsen